Kalt í Kaunas

Føroyska ferðalagið við landsliðsleikarum, fjølmiðlum og áskoðarum kom fram í øllum góðum til Kaunas mikukvøldið, og fyrstu venjingarnar hava longu verið á skránni

LANDSLIÐSFERÐ
Jákup Mørk/
Álvur Haraldsen

KAUNAS: Føroyska fótbóltslandsliðið kom fram í øllum góðum mikudagin. Megin parturin av ferðalagnum kom úr Føroyum við flogfarinum hjá Atlantic Airways, men landsliðsvenjarin sjálvur, Henrik Larsen kom saman við Jón Róa Jacobsen, Jákup Mikkelsen og Christian Høgna Jacobsen við flogfari úr Danmark, og møtti so restini av ferðalagnum á Best Western hotellinum, sum landsliðið býr á.

Umframt landsliðsleikarar og fjølmiðlar, so taldi ferðalagið eisini einar 40 føroyskar áskoðarar, sum hava valt at taka allan túrin til Litava og Týsklands, og væntandi fara hesi at gera sítt til, at føroysku landsliðsleikararnir kunnu kenna seg eitt sindur heima, tá teir leygardagin fara á vøllin. Tað kann væl vera, at hesir fara at rópa og veipa nakað undir dystinum, men tað stendur í øllum førum greitt, at tey mugu bjálva seg hampuliga væl. Mikudagin, tá flogfarið lendi, var hitin ikki meira enn eini fimm stig, og roknast kann við, at hitastigini vera ikki fleiri enn trý, tá spælt verður leygarkvøldið.

Vandu alt fyri eitt

Longu mikukvøldið hevði landsliðið fyrstu venjingarnar á ferðini, og sum sæst aðra staðni á hesum síðum, so eru einstakir spælarar eitt sindur ivasamir.

Ringast stendur til hjá Jákup á Borg, sum er skaddur í lærkrikanum. Pól Thorsteinsson hevur nakað av krími og Jóhannis Joensen fekk eitt spark á øklaknútin undir venjing. Jens Pauli Marstein er lækni á ferðini, og hann skal jú eisini hava nakað at gera, og mikukvøldið var ikki so nógv, sum bendi á, at leikararar ikki verða tøkir leygardagin.

Føroyska ferðalagið verður verandi í Litava fram til sunnudagin, tá leiðin verður løgd til næsta stop á ferðini, sum er Hannover í Týsklandi.

Vit verða ellivu

Eitt sindur óvæntað slapp landsliðið longu mikudagin at venja á dystarvøllinum, og hetta tóktist venjarin at vera væl nøgdur um

LANDSDYSTUR
Jákup Mørk/
Álvur Haraldsen

KAUNAS: Tað kendist eitt sindur sjáldsamt, at føroyska landsliðið longu mikukvøldið slapp at spæla á vøllinum, har landsdysturin skal leikast, men orsøkirnar til hetta eru tó einfaldar. Tað er snøgt sagt eingin annar vøllur, har føroyska liðið fær vant um kvøldið, tí S. Darius & S. Gireno leikvøllurin er tann einasti í Kaunas, har ljós eru sett upp.

Landsliðsvenjarin, Henrik Larsen, frøddist eisini um hetta, og hann helt eisini, at hetta kundi gerast ein fyrimunur hjá føroyska liðnum.

– Sjálvandi skalt tú ikki tosa um fyrimunur, tá tú spælir á útivølli, men tað hevur sjálvandi nakað at siga, at vit longu nú hava roynt vøllin. Tað er helst bert, tí vit venja so seint í kvøld, so eg rokni ikki við, at teir eru somikið gestablíðir aftur í morgin. Men sjálvandi er tað ein fyrimunur, at vit longu nú hava roynt vøllin, ístaðin fyri at bíða til fríggjadagin, sum tað vanligt, segði landsliðsvenjarin, sum annars helt, at vøllurin var heilt góður.

Henrik Larsen sigur, at landsliðsleikararnir nokk skulu verða ellivu í tali, tá teir fara inn á vøllin í Kaunas

Vit verða 11

Um sjálvt liðið var landsliðsvenjarin eitt sindur meira opin, enn undangongumaður hansara vanliga var.

– Jákup á Borg er hálvskaddur og Pól hevði nakað av krími, so enn veit eg sjálvandi ikki, hvørt teir kunnu spæla leygardagin, men eru teir klárir, so spæla teir. og Øssur Hansen havi eg so ikki tikið við fyri at seta hann á beinkin. Verður Pól ikki við, so er tað sjálvandi upplagt, at eg nýti Jóhannis ístaðin fyri, men hann fekk ein lítlan snudd í kvøld, so eg veit ikki rættliga, hvussu verður og ikki, men tú kanst verða vísur í, at vit undir øllum umstøðum verða ellivu mans, sum fara á vøllin, helt venjarin.

Annars tykist einasta ivamálið at vera, hvør fer at manna málverjasessin. Jens Martin fekk fyrsta val, tá landsliðið spældi ímóti Skotlandi, so í útgangsstøðinum er hann kanska favorittur til plássið, men hinvegin tykist Jákup Mikkelsen eisini at vera væl fyri, so kanska verður hetta ikki avgjørt fyrr enn í seinastu løtu, eins og tað varð móti Skotlandi. Men burtursæð frá málverjaplássinum, so tykist lítil ivi at vera um, at føroyska liðið spælir soleiðis, um allir mans verða tøkir.

Pól Thorsteinsson, Óli Johannesen, Jón Rói Jacobsen, Jens Kristian Hansen - Jákup á Borg, Fróði Benjaminsen, Julian Johnsson, Øssur Hansen, John Petersen, Christian Høgni Jacobsen.

Bert fyri Pól

Pól Thorsteinsson hevði nakað av krími mikudagin, og er tí eitt av ivamálunum hjá landsliðsvenjaranum til leygardagin

FÓTBÓLTSPRÁT
Jákup Mørk/
Álvur Haraldsen

KAUNAS: Undir venjingini mikukvøldið sást ein einsamøll vatn-fløska standa við vøllin, sum bar frámerki, soleiðis at óviðkomandi ikki skuldu drekka hana.

Orsøkin til hetta var, at Pól Thorsteinsson hevur nakað av krími, og at hetta undir ongum umstøðum skal smitta til aðrar leikarar.

»Bert fyri Pól« stóð á fløskuni, men hetta var einamest fyri at tryggja, at aðrir leikarar ikki eisini verða hóttir av krími

Tá vit eftir venjingina fingu orðið á Pól, roknaði leikarin tó ikki sjálvur við, at hetta fór at verða nøkur forðing leygardagin.

– Nei, tað rokni eg ikki við. Talan er ikki um nakað ógvusligt krím, og tað er ikki so, at eg eri eymur í vøddum og liðum, men hinvegin kendi eg væl á mær, at eg eri eitt sindur slakkur. Men tað fáa vit so at síggja leygardagin. Verður tað ikki verri, enn tað er nú, so er nokk eingin vandi fyri dystinum.

Klárur til brotsspørkini

Besti føroyski málskjúttin í ár sigur seg ikki rokna við at byrja inni leygardagin, men fær hann møguleikan, so er hann klárur

FÓTBÓLTSPRÁT
Jákup Mørk/
Álvur Haraldsen

KAUNAS: Nú kappingarárið er av, kann staðfestast, at Andrew av Fløtum av Fløtum gjørdist besti málskjúttin í føroysku landskappingini. 18 mál í 18 dystum varð endaliga úrslitið fyri hansara viðkomandi, og hetta var so meira, enn nakar annar megnaði. Men hóast hann sjálvandi fegnast um hetta, so ásannar hann tó, at hetta ikki gevur nakra vissu fyri einum landsliðsplássi.

– Nú fáa vit at síggja. Tað var í øllum førum stuttligt at gerast toppskjútti og fáa gylta skógvin, men tað er so bara til annað beinið. Vónin er so, at eg einaferð seinni – kanska næsta ár – kann fáa ein eins skógv til hitt beinið.

– Um vit fáa brotsspark, so átti Henrik at umhugsað eina skjóta útskifting, heldur Andrew av Fløtum flennandi fyri, tá tosið fellur inn á møguligar brotssparksskjúttar

John er eingin trupulleiki

Men hóast hendan heiðurin, so roknaði Andrew ikki við, at tað fer at verða pláss fyri honum millum teir fyrstu ellivu, tá landsliðið leygardagin fer á vøllin í Kaunas.

– Nei, tað má eg nokk síggja í eyguni, at í løtuni eri eg ikki fremsta val til sessin har frammi, og tað er sum so eisini í lagi. Eg má so bara royna at arbeiða meg fram ímóti at gerast fastur maður, tí sjálvandi er tað tað, sum eg miði ímóti. Fleiri eru av teirri áskoðan, at tú og John Petersen kanska líkjast ov nógv í spælistíli, og at hetta er ein orsøk til, at tú situr á beinkinum. Ert tú ikki sjálvur bangin fyri at sita á beinkinum, so leingi John spælir á landsliðnum?

– Nei, tað haldi eg ikki. Tað kann gott vera, at vit kunnu nøkur av teimum somu tingunum, og at okkum báðum dámar væl at leita oman á vøllin, men fyri tað er ikki víst, at vit ikki kunnu vera inni ísenn, Tvørtur ímóti haldi eg, at vit kundu rigga sera væl saman, og tað er so mín vón, at hetta eisini verður veruleiki. Tað vildi verið stuttligt at spælt saman við honum á landsliðnum, og tað er undir ongum umstøðum so, at eg bara ætli mær at sita á beinkinum og bíða eftir, at ein leikari gevst. Eg má bara sannføra venjaran um, at eg eiga at teljast millum teir fyrstu. Tað er so málkiði í øllum førum, heldur hann.

Ein skjót útskifting

Á einum øki er tó lítil ivi um, at Andrew av Fløtum er stinnari enn John Petersen, og tað er í brotsspørkunum. Hóast John uttan iva telist millum teir fyrstu at skjóta brotsspark á landsliðnum, so hevur árið í ár ikki hepnast so væl í so máta, har B36-liðskiparin hevur misnýtt tvær ferðir úr ellivu metrum.

Hinvegin hevur Andrew á Fløtum havt hendan møguleikan átta ferðir í landskappingini, og hvørja ferð er bólturin sendur ósvikaliga trygt í netið. Tá vit at enda spurdu, um hesin eginleikin ikki eisini átti at teljast við, var HB-toppskjúttin skjótur at svara, at sjálvandi skuldi hann tað.

– Eg vil í øllum førum siga so, at um vit fáa brotsspark, so átti Henrik at umhugsað eina skjóta útskifting. Nei, heilt alvorligt, so vildi eg í øllum førum ikki sagt nei-takk, um eg skuldi fingið møguleikan. Eg skal ikki siga, at eg hevði lobbað hann forbi málverjan, men eg skuldi nokk skorað, tað ivist eg ikki í, sigur maðurin við gylta skógvinum at enda.

Lærið argar

Jákup á Borg var ikki við til mikudagsvenjingina, men sjálvur roknaði hann tó við, at hann fekk spælt leygardagin

FÓTBÓLTSTOS
Jákup Mørk/
Álvur Haraldsen

KAUNAS: Einasti maðurin, sum ikki vandi, tá landsliðið longu mikukvøldið hevði fyrstu venjingarnar, var Jákup á Borg, sum annars hevur tikið mest sum ognarrætt upp á høgra miðvallarplássið á føroyska landsliðnum.

Hesa ferð er tað lærkrikin, sum argar, og eisini hevur gjørt tað eina tíð. Skaðin kom, tá B36 spældi móti EB/Streymi í trið seinasta umfarinum, og síðani hetta hevur Jákup bert spælt tey trý korterini, sum hann var á vøllinum, tá B36 í seinasta umfarinum vann 6-0 á VB. Millum annað viðtveimum málum frá Jákup á Borg.

Ein eymur lærkrikið hevur argað Jákup á Borg seinastu vikurnar, men sjálvur roknar hann tó at spæla nú leygardagin

Tekur kjansin

Stendur tað til Jákup sjálvan, so er tó lítil ivi um, at hann hóast alt fer at teljast millum leikararnar, tá landsliðið leygardagin marsjerar inn á vøllin.

– Tað rokni eg næstan við. Sjálvandi ger skaðin fortreð, men eg tosaði við Henrik alt fyri eitt, sum skaðin kom, og hann hevur alla tíðina hildið, at eg skuldi koma við, Og so er hetta eisini endin á kappingarárinum. Tað merkir so í øllum førum, at um eg satsi, og kanska geri skaðan verri við at spæla, so havi eg hóast alt næstan hálvt ár at koma fyri meg í, og ikki bara eina viku, sum talan hevði verið um, um vit nú vóru miðskeiðis í kappingarárinum, sigur Jákup á Borg á enda.

EM-undankappingin, bólkur 5

	dystir	v - j - t	vunnin mál	tapt mál	málmunur	stig
1 Týskland	1	1 - 0 - 0	2	0	2	2
2 Føroyar	1	0 - 1 - 0	2	2	0	1
3 Skotland	1	0 - 1 - 0	2	2	0	1
4 Ísland	0	0 - 0 - 0	0	0	0	0
5 Litava	1	0 - 0 - 1	0	2	-2	0

Spældir dystir:
Føroyar-Skotland 2-2
Litava-Týskland 0-2

Komandi dystir:
Ísland-Skotland 12. okt.
Litava-Føroyar 12. okt.
Ísland-Litava 16. okt.
Týskland-Føroyar 16. okt.